Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður

Svar

uppá

fyrispurning nr. 29/2019 frá Brandi Sandoy, løgtingsmanni, um ALS-útgjald til fiskimenn, tá skip teirra verður lagt vegna umvælingar.

Spurningurin var soljóðandi:

1) *Vísandi til § 2 í kunngerð um útgjald til fiskimenn, tá ið skip teirra verða løgd vegna umvælingar, er tað so framvegis ein treyt fyri at fáa ALS-útgjald, at fiskifarið, ið ein fiskimaður er við, skal hava veiðiloyvi?*

2) *Hvør er orsøkin til, at fiskimenn í hesi støðu ikki kunnu fáa útgjald, fyrr enn 30 dagar eru farnir, meðan øll onnur fáa, tá 10 dagar eru farnir?*

3) *Hvør er orsøkin til, at fiskimenn í mesta lagi fáa útgjald í 60 dagar?*

4) *Vísandi til § 5, stk. 2 í kunngerðini, hvør er so orsøkin til, at hesar ásetingar bara eru galdandi fyri okkara fiskimenn, og ikki fjøldina sum heild?*

Svar:
Til nr. 1
ALS hevur tillagað krav av skjalprógvan av veiðiloyvi samsvarandi ásetingunum í lógini um fyrisiting av sjófeingi og krevur tí ikki veiðiloyvi, men m.a. at skipið er heimahoyrandi í Føroyum.

Til nr. 2
Arbeiðsloysisskipanin hevur til endamáls at veita fíggjarligan stuðul til arbeiðsleys, at virka fyri bøttum møguleikum hjá arbeiðsleysum at fáa arbeiði og at umsita arbeiðsávísing fyri føroyska arbeiðsmarknaðin.

§ 20 a í ALS-lógini er ein serskipan fyri fiskimenn, tí treytirnar fyri at koma undir skipanina eru nakrar aðrar enn fyri at fáa vanliga arbeiðsloysisstuðulin. Tað serstaka fyri fiskimenninar er, at teir ikki eru arbeiðsleysir, men framvegis hava eitt setanartilknýti til arbeiðsgevaran. Hesir hava sostatt betri sømdir enn aðrir løntakarar at koma í Arbeiðsloysisskipanina.

Fiskimenn, ið eru uppsagdir ella hava sagt upp, koma inn í Arbeiðsloysisskipanina eins og allir aðrir løntakarar og við somu treytum. Varðveita teir harafturímóti sítt setanartilknýti til arbeiðsgevaran, meðan skipið er til umvælingar, fáa teir útgjald sambært serskipanini í § 20 a og tilhoyrandi kunngerð.

Sambært ALS-lógini fáa øll, sum hava rætt til arbeiðsloysisstuðul, millum 2 og 10 bíðidagar. Um inntøkan er 250.000 kr. ella minni, verða tveir bíðidagar roknaðir, og fyri hvørjar heilar 100.000 kr. inntøkan hækkar, hækka bíðidagarnir við tveimum bíðidøgum, tó í mesta lagi 10 dagar.

Eisini er tað galdandi fyri bíðidagar, at mynstrar persónur, sum fær útgjald úr Arbeiðsloysisskipanini, við skipi, og mynstringin er styttri enn ein mánað, verður ikki roknað við bíðidøgum. T.v.s. at skipanin leggur upp fyri, at bíðidagar ikki gerast ein forðing fyri at mynstra styttri túrar.

Hartil skal nevnast, at bíðidagar eru kalendaradagar – ikki útgjaldsdagar úr ALS. ALS-útgjaldsdagarnir eru 253 árliga.

Onki skrivað tilfar er um orsøkina til, at fiskimenninir hava 30 bíðidagar, áðrenn teir kunnu fáa útgjald úr ALS. Helst er orsøkin til herdu treytirnar fyri útgjaldi til fiskimenninar, at hesir hava betri treytir enn aðrir løntakarar at koma í skipanina.

Til nr. 3

Fyri at svara spurninginum verður víst til lógarviðmerkingarnar, sum siga, at:

"Ilt er at meta um ávirkanina, við tað at eingi hagtøl eru til taks. ALS hevur tí vent sær til Fiskimannafelagið fyri at fáa eina meting av hesi áseting. Fiskimannafelagið vísir til eina uppgerð, sum sigur, at tað eru umleið 30 skip, sum árliga kunnu koma undir hesa áseting, og at tað eru áleið 375 fiskimenn við hesum skipum, sum tilsamans liggja í áleið 67 dagar. Við uppskotinum til hækkan av stuðli eftir grein 16 (red.: hægsti arbeiðloysisstuðul var í somu lógarbroyting hækkaður) merkir hetta, at hesir (red. 375) fiskimenn kunnu fáa í mesta lagi kr. 759.950 fyri hvønn útgjaldsdag fyri í miðal 37 dagar (67 dagar frároknað karantenu á 30 dagar). Hetta gevur ein kostnað á áleið 10,5 mió. kr." (Í álitinum, sum lógarbroytingin var grundað á, stendur "...kr. 950 fyri hvønn útgjaldsdag...".)

Ásetingin av teim 60 døgunum er sostatt ásett út frá upplýsingum frá Fiskimannafelagnum og við støði í eini meting av, hvat tað fór at kosta ALS at gera serskipanina fyri fiskimenn.

Teir 60 dagarnir, nevndir í kunngerðini, eru útgjaldsdagar, sum svara til umleið 3 mánaðir við arbeiðsloysisstuðli.

Til nr. 4

Sum áður svarað, er talan um eina serskipan fyri fiskimenn, sum eru við skipi, sum er lagt vegna umvælingar. Hesir eru sostatt betur stillaðir enn arbeiðsleys at koma í Arbeiðsloysisskipanina. Uppsagdir fiskimenn eru stillaðir eins og øll onnur í Arbeiðsloysskipanini.

Fyri hvørjar 1.000 kr., sum útrokningargrundarlagið (A-inntøkan) hjá fiskimanninum fer upp um 210.000 kr., minkar útgjaldið við 0,5 prosentstigum. Onki skrivað tilfar er um júst hesa ásetingina; tí er ilt at vita, hvør orsøkin til hana er.

Umhvørvis- og vinnumálaráðið, tann 16. desember 2019

Helgi Abrahamsen
landsstýrismaður